Barnagarðurin í Gøtu skjótt liðugur

Arbeiðið við barnagarðinum í Gøtu er nú komið so langt, at ætlanin er, at hann verður latin upp 1. februar. Pláss verður fyri 60-65 børnum, sigur bygdaráðsformaður



Um nakrar fáar dagar, letur barnagarðurin við Gøtugjógv upp. Hann skal húsast í hølunum har studentaskúlin fyrr helt til, og umbyggingin er nú um at vera liðug. Pláss verður fyri 60-65 børnum í nýggja barnagarðinum, og Jógvan Gregersen, bygdaráðsformaður, væntar, at ansingartørvurin í Gøtu verður loystur við nýggja stovninum
Myn: Jens Kristian Vang

SVEINUR TRÓNDARSON

Nú fer at líða við arbeiðinum uppá barnagarðin í Gøtu. Farið var undir arbeiðið í juli mánaði í fjør, og síðani hevur verið arbeitt av allari megi, fyri at fáa arbeiðið liðugt áðrenn 1. februar. Tá er ætlanin, at nýggi barnagarðurin skal lata upp.

Tað hevur verið ætlanin at byggja barnagarð í Gøtu í fleiri ár, men ætlaninar eru ongantíð vorðnar veruleiki fyrr enn nú.

Jógvan Gregersen, bygdaráðsformaður í Gøtu, sigur, at teir valdu hesa loysnina fyri at fáa bilbukt við bíðilistanum, sum er vorðin í longra lagið, og hann væntar, at barnagarðurin fer at nøkta tørvin á ansingarplássum í Gøtu.

– Tað er rúm fyri 60-65 børnum í nýggja barnagarðinum, og sum bíðilistin sær út í løtuni, er tað um tað lagið, at tað fer at vera nóg mikið, sigur hann.

Tað er gamli studentarskúlin við Gøtugjógv, sum er bygt um til barnagarð, og hann er innrættaður soleiðis, at tað eru tvær barnagarðsstovur, ein vøggustova, og ein stova til 7-10 ára gomul børn.

Kostnaðurin fyri umbyggingina er ikki liðugt uppgjørdur enn, men Jógvan Gregersen væntar, at hann fer at liggja um 2,5 mió. krónur, tá liðugt er.

Gøtu Kommuna hevur sett 8 pedagogar í starv við barnagarðin og harumframt eru 5 dagrøktarmammur eisini settar í starv sum hjálparfólk.

Barnaansingin í Gøtu hevur higartil verið skipað við dagrøkt burturav, men nú nýggi barnagarðurin verður tikin í nýtslu, verða dagrøktarplássini væntandi niðurløgd.

Tað er Svenn Olsen, byggimeistari, sum hevur staðið fyri arbeiðinum við at gera hølini til barnagarðin, og tað er Elias Hansen, sum hevur projekerað arbeiðið og havt byggieftirlitið

Nýtt mánaðarblað á veg

Einaferð í vár kemur eitt nýtt føroyskt blað á marknaðin. Tað eru føroyskir journalistar, sum búgva í Danmark, sum hava tikið seg saman fyri at gera nýggja blaðið, sum ikki hevur sæð sín líka í Føroyum áður

SVEINUR TRÓNDARSON

Um tveir mánaðir ella so, kemur eitt nýtt føroyskt blað á marknaðin.

Tað eru føroyskir journalistar, búsitandi í Danmark, saman við einum tíðindafólkið í Føroyum sum hava tikið seg saman við tí fyri eyga, at geva nýggja blaðið út, og teir leggja dent á, at talan ikki er um ein kappingarneyta til føroysku dagbløðini.

– Talan er um eitt mánaðarblað, ella eitt magasin, so tað verður ikki upp á tal at kappast við dagbløðini, sigur Grækaris D. Magnussen, sum er ein av fyrireikarunum.

Hann sigur, at hetta blaðið verður øðrvísi í sínum uppbygnaði, fyrst og fremst tí, at talan verður um eitt mánaðarblað, og tí verður innihaldið viðgjørt øðrvísið enn tað vanliga verður í dagbløðunum.

– Fyrimunurin hjá okkum er, at vit bara gera eitt blað um mánaðin, og tískil fáa vit betri stundir at viðgera tað tilfari, sum skal í blaðið, sigur hann.

Fjølbroytt innihald

Tá talan er um eitt mánaðarblað, so er ofta talan um fjølbroytt og ofta drúgt tilfar. Verður tað eisini so við nýggja blaðnum?

– Sjálvandi er tað ætlanin, at tilfari skal vera fjølbroytt og gjøgnumarbeitt, men tað skal sanniliga eisini vera lætt lesandi. Tað er okkara mál, at hetta blaðið skal vera nakað fyri øll, og ikki bara fyri tann intelektuella. Omman í Svínoy og abbin í Skúvoy skulu eisini hava hug at lesa blaðið, sigur Grækaris.

Sum dømi um tilfari í blaðnum nevnir hann útlendskt tilfar. Føroysku fjølmiðlarnir í heila tikið, gera ikki so nógv við tað útlendska tilfari, og í flestu førum er viðgerðin ógvuliga grunn, heldur hann.

– Hetta skal ikki skiljast sum ein kritikkur, tí stundir eru sjáldan til djúpri viðger, men tað er hetta vit ætla okkum undir. Vit ætla okkum at viðgera útlendskar persónar og hendingar við at fara afturum tey einstøku »evnini«. Á tann hátt verður tilfari í blaðnum eisini øðrvísið enn tað er í dagbløðunum.

Kritiskur journalistikkur

Annars nevnir Grækaris, at tað sjálvsagt eisini verður føroyskt tilfar í blaðnum.

– Meginparturin av tilfarinum verður sjálvandi føroyskt, og vit ætla okkum at leggja dent á kritiska viðger av ymsum málum. Hetta er eisini ein mangulvøra í journalistikkinum har heima í dag, og hongur uttan iva saman við, at framleiðslukrøvini eru so stór, at mann, heldur ikki her, kemur nóg væl í dýpdina, sigur Grækaris.

Grækaris leggur annars dent á, at hetta blaðið heldur ikki skal verða eitt útisetablað burturav.

– Nei, tað skal tað ikki. Innihaldið er ikki ætlað nøkrum einstøkum bólki av føroyingum heima ella úti, men tað er ætla øllum føroyingum, sigur Grækaris.

Nær nýggja blaðið kemur á gøtuna fyrstu ferð er ikki heilt greitt enn, tí fyrireikararnir eru í ferð við at kannað ymisk viðurskiftið, men Grækaris væntar og vónar, at tað fer at eydnast at koma út einaferð til várs.

– Fakliga er hetta ein sera spennandi uppgáva, sum vit gleða okkum ógvuliga nógv at fara undir, sigur hann.

Ikki er heilt greitt heldur hvar nýggja blaðið fer at húsast, men eisini tí verður, sum vera mann arbeitt við.

Umframt Grækaris D. Magnussen fara Kári Durhuus, Kári Mikkelsen, Per Højgaard og Ólavur Rasmussen

Gøtumenn fáa sóttreinsiverk

Um ikki so langa tíð verður nýggja sóttreinsiverkið hjá gøtumonnum tikið í nýtslu

SVEINUR TRÓNDARSON

Um ikki so langa tíð verður nýggja sóttreinsiverkið hjá Gøtu Kommunu tikið í nýtslu.

Jógvan Gregersen, sigur, at tað eru krøv frá heilsumyndugleikunum og so tann veruleiki, at vatnið um heystið, ofta er ógvuliga skitið, sum ger, at kommunan nú hevur valt at fara undir hetta arbeiði.

– Samstundis hava vit eisini gjørt nýggjan vatnbrunn, sum tekur eini 800 tons, so nú eru tey viðurskiftini í lagið, sigur Jógvan.

Hann leggur afturat, at eitt sóttreinsiverk eisini verður sett upp í Syðrugøtu, og tá tað er gjørt, hevur kommunan brúkt uml. 2,5 mió. krónur til vatnverkið.

Tað her J. A. Smíð, sum hevur gjørt bygningin, Nomatek hevur gjørt sóttreinsiverkið og brunnurin er gjørdur við Gjógv

Dagfinn sýnir fram

Fríggjadagin lat Dagfinn Olsen upp listaframsýning í hølunum hjá Tutl

Umframt at vera listamaður við penni, dámar Dagfinni eisini væl at taka gittarin fram *Mynd: JKV*

SVEINUR TRÓNDARSON

Fríggjadagin í seinastu viku lat Dagfinn Olsen upp listaframsýning í hølunum hjá plátufelagnum Tutl. Hann er tann fimti í røðini av »ókendum« listafólki, sum sýna fram hjá plátufelagnum.

Listaverkini verða hangandi til 7. februar tá næsta listafólkið sleppur framat.

Hetta er fyrstu ferð Dagfinn sýnir fram einsamallur. Heilt óroyndur er hann kortini ikki, tí hann hevur verið við til Ólavssøkuframsýningina tríggjar ferðir.

Á framsýningini eru bæði tekningar og málningar, sum eru gjørdar í tíðarskeiðnum eftir 1993.

Teldusníkar á fer›

Hóreiggja›u sær á telduservarum hjá føroyskum fyritøkum

Annar sigur seg hava havt ótálma›a atgongd til telduservara hjá Føroya Tele, so at hann kundi broytt eina og hvørja privata heimasí›u í landinum. Hin breyt inn í telduservaran hjá internetcaféini Orbits í Havn, har hann kundi gjørt stóran ska›a.

DÁNJAL HØJGAARD

Mangt bendir á, at trygdin hjá Føroya Tele var ikki nóg, tá stovnurin fyri nøkrum átrum sí›ani sleit sínar barnaskógvar á internetøkinum.

Sosialurin hevur í hvussu so er tosa› vi› ein 20 ára gamlan mann, sum vil vera vi›, at hann einafer› í 1997 fekk so at siga óavmarka›a atgongd til FTP-servaran hjá Føroya Tele. Hetta er telduservari, sum m.a. ver›ur brúktur til, at at seta upp allar privatar heimasí›ur í Føroyum.

"Boring Homepage"

Vanliga kanst tú bert seta upp og broyta tína egnu heimasí›u á FTP-servaranum hjá Føroya Tele.

Men sambært tí 20-ára gamla manninum stó›u dyrnar til FTP-servaran ví›opnar, tá hann einafer› skuldi eini ørindi inn á servaran.

-Eg kundi broytt allar heimasí›urnar, um eg leg›i í. Ta›, sum eg gjørdi var, at eg fór inn og broytti eina heimasí›u. Eg setti eina heldur ónærisliga mynd inn og gav heimasí›uni yvirskriftina"The Most Boring Homepage on the Internet", grei›ir tann 20-ára gamli frá.

Hann heldur, at Føroya Tele sveik trygdina vi› at lata dyrnar til FTP-servaran standa ví›opnar.

-Ta› var eingin trygd. Ta› var opi›. Ta› var ikki "skrivi-vart" ella naka› sum helst, sigur hann, og grei›ir frá, at ta› var bert ta› einu fer›ina, at hann hev›i frítt spæl á servaranum.

Sosialurin setti seg í samband vi› eigaran av heimasí›uni, sum tann 20 ára gamli sigur seg hava framt herverk á. Eigarin váttar fyri bla›num, at onkur uttanífrá broytti heimasí›u hansara fyri nøkrum árum sí›ani.

Ber ikki til nú

Páll Wiberg Joensen, lei›ari á internetdeildini hjá Føroya Tele, sigur, at hann kann hvørki vátta ella avsanna um FTP-servarin hevur stati› opin so tí›iliga í tí›ini. Hendingin kann vera farin fram í tí›ini, tá Tele Danmark umsat telduservaran fyri Føroya Tele, sigur hann.

-Men hetta skal ikki bera til í dag, vissar hann um.

-Tú kanst fara inn og síggja heimasí›urnar hjá ø›rum. Men tú kanst ikki redigera, sletta ella naka› - uttan títt egna, sigur Páll Wiberg Joensen.

Kanska tikin á bóli

Jan Rein er ta› tey rópa netumsitari og tekur útbúgving sum datanomur í næstum. Hann útilokar ikki, at Føroya Tele kann hava veri› tiki› á bóli, me›an stovurin enn var ungur og óroyndur á internetøkinum.

-Ta› er beklagiligt um ein persónur kann fáa fría atgongd til FTP-servaran, so at hann kann broyta heimasí›ur.

-Eg vænti, at ta› man hava veri› ein fleilur, heldur enn eitt trygdarbrot. Kanska hava teir gjøgnumsko›a nøkur ting, sum teir ikki vistu tá í tí›ini, sigur hann um Føroya Tele.

Innbrot í Orbits

Ein annar teldusníkur, sum Sosialurin hevur havt samband vi›, breyt fyri eini tí›sí›ani inn í telduskipanina hjá internetcafeini Orbits í Havn.

-Eg kundi taka spøl frá teimum, seta printaran, at skriva út í ta› óendaliga. , sigur hann.

Stjórin í Orbits, Áki Johansen váttar, at teldusníkur hevur veri› upp á spæl.

-Hann kundi havt lagt okkum lamnar, sigur Áki Johansen um innbrotsmannin, sum var› avdúka›ur - men ikki melda›ur.

-Vit hava givi› honum bo› um at ver›ur hann fanga›ur aftur, so ver›ur hann melda›ur, sigur Áki Johansen.

Orbist metir seg kortini ikki at hava nakrar loynidómar liggjandi inni í síni telduskipan. Tískil hevur fyritøkan ikki gjørt íløgur í d‡r forrit, til tess at verja seg móti teldusníkum.

Annar teldusníkurin, Sosialurin hevur tosa› vi› sigur seg eisini hava broti› inn í telduskipanina hjá Atlantic Radio.

Sum skilst hava allar stórar fyritøkur og stovnar serligar verdarskipanin móti teldusníkum.

Føroya Tele: Eingi innbrot

Føroya Tele veit ikki um, at teldusníkar hava veri› inni á skipaninum hjá stovninum

DÁNJAL HØJGAARD

Teir hava roynt, men eingin er sloppin inn, ljó›a bo›ini.

Dimmalætting sta›festi longu í november 1998, at teldusníkar høvdu veri› upp á spæl

Bla›i› skriva›i tá, at Føroya Tele hev›i skrásett fleiri royndir, at bróta inn í skipanir hjá stovninum og kundum. Og stovnurin umhugsa›i at melda málini.

-Teir hava banka uppá, men eingin er sloppin inn, sigur Páll Wiberg Joensen, lei›ari á internetdeildini hjá Føroya Tele vi› Sosialin.

Eingi innbrot

Páll Wiberg Joensen sigur, at Føroya Tele fær javnan bo› frá vi›skiftafólkum - bæ›i privatum internetbrúkarum og virkjum - um at teldusníkar hava roynt at broti› inn. Men Føroya Tele veit ikki um nakran kunda, sum hevur havt innbrot, sigur hann.

Spurningurin er so hví stovnurin ikki hevur valt at melda innbrotsroyndirnar til politii›.

-Vit hava ikki sæ› nakra grund til at melda -upp á okkara skinn, sigur Wiberg Joensen, og leggur afturat, at Føroya Tele hevur valt at lata kundarnar sjálvar melda hackingmálini.

Føroya Tele avvísir samstundis, at ta› hev›i naka› vi› teldusníkar at gera, tá fyritøkan tí›iliga í 1999 skifti kondurnar út hjá føroyskum internetbrúkarum.

-Ta› var ein uppgradering av okkara hardware-park, sigur lei›arin á internetdeildini.